

Peregrino-økið í Brasil. Mynd: Øyvind Hagen/Statoil

# Statoil ger fleiri íløgur í Brasil

**Jógvan Hugo Gardar**

02.03.2015 - 03:32

Oljan.fo

Sjálvt um oljuprísurin er dottin á botn, og Brasil er rakt av eini risa korrupsjónsgølu í oljuídnaðinum, so ynskir norska oljufelagið Statoil at gera stórar íløgur í oljuídnaðin í landinum. Sambært Dagens Næringsliv skal Statoil brúka umleið 27 milliardir norskar krónur í landinum. Millum annað ynskir Statoil at byggja ein triðja boripall til Peregrino-økið.